# The Sweet á Jóansøkufestivalinum

**Nú er greitt, at stóra navnið frá sjeyti- og áttatiárunum, The Sweet, eru við á Jóansøkufestivalinum á Tvøroyri. Umframt nógvar føroyskar bólkar, eru The Sweet útlendska umboðanin, umframt íslendska kvinnubólkin Nylon. The Sweet høvdu í sjeyti- og áttatiárunum eitt ótal av hittum, so sum Fox on the Run, Little Willy, Wig Wam Bam, AC/DC, Teenage Rampage, Ballroom Blitz, Hellraiser og Love is like oxygen**

JÓANSØKUFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*




*So er stóra navnið komið á plakatina til jóansøkufestivalin. Tað verður enska Sweet, sum skal syrgja fyri, at áhoyrararnir koma á jóansøkuna*

The Sweet er ein hin kendasti bólkurin frá sjeytiárunum og nakað inn í áttatiárini. Enski bólkurin kom á sonevndu glamrockbyrgjuni á hægstu tindar og hevði øll hesi ár eina ørgrynnu av hittum. Nevnast kunnu Fox on the Run, Little Willy, Wig Wam Bam, AC/DC, Teenage Rampage, Ballroom Blitz, Hellraiser og Love is like oxygen og onnur.

Nú vitjar The Sweet í Føroyum. The Sweet standur á plakatini fyri Jóansøkufestivalin. Í dag standur guitarleikarin Andy Scott á odda. The Sweet eru á ferð í alt summar í Europa og á jóansøku leggja teir altso leiðina til Suðuroyar á jóansøkufestival.

Bólkurin, sum meira enn nakar annar bretskur bólkur setti dagsskránna í sjeyti- og áttatiárunum, kemur til Føroya at vitja í summar, og óivað eru allar heimsplágurnar, sum teir lótu úr hondum hesi árini, á skránni.

At nøvn frá hesum árunum vitja í Føroyum er ikki ókent, men The Sweet má sigast at hava sett sær fleiri varðar, enn tey flestu, tá um ræður røðina av hittum, sum bólkurin lat eftir seg. Fyrst við íoyrafallandi løgum, sum lurtarin beinanvegin kundi taka til sín, og síðani so spakuliga yvir til Fox on the run og til endans óføra lagið Love is like oxygen. Eitt tyssi, ið inniheldur blómur í øllum litum.

## Kend nøvn

Umframt heimsnavnið Sweet, so koma genturnar úr íslendska bólkinum Nylon at vitja og prýða jóansøkupallin. Millum føroysku nøvnini er nú greitt, at har teljast m.a. Makrel, Deiggj sum Gasolin' Jam, Guðrun Sólja Jacobsen, Paradox og The Dreams, sum júst nú eru við í spennandi kapping í MTV.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM




**3-daga CRUISE**
**mánadag til mikudag**
við gisting á hotelli í 1 nátt
**fyri hvønn**
**úr 1.450,-**
Prísdømi er galdandi fyri lágárstíð

**6-daga CRUISE**
**fríggjadag til mikudag**
við gisting á hotelli í 4 nætur
**fyri hvønn**
**úr 2.850,-**
Prísdømi er galdandi fyri lágárstíð

Prísirnir fata um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Lerwick og gisting á hotelli í Hetlandi (matur og drykkjuvørur eru ikki íroknað).

SMYRIL LINE

**Droym tað ikki – royn tað!**

**Til sølu**

**Hús í vesturbýnum í Tórshavn**



**Sethúsaognin oman Mattalág 5, Tórshavn**
Húsini eru í 3 hæddum við lofti, miðhædd og kjallara. Samlað búvídd er 405 m². Á loftinum er hjúnarúm, 5 kømur, gongd, umframt baðirúm. Í miðhæddini er køkur, grovkøkur, hjallur, 3 stovur, wc og gongd.
Í kjallaranum er inngongd til tær ovaru hæddirnar umframt ein íbúð. Í íbúðini er hjúnarúm, 2 kømur, baðirúm, køkur, vaskirúm og egin inngongd.
Grundøkið er 587 m².
Arkitektteknaðu húsini eru bygd í 1975.
Húsini hava sera gott útsýni og liggja í friðarligum umhvørvi við blind veg og út til grønt fríøki.

**Hús á Tvøroyri**



**Sethúsaognin matr. nr. 442 á Tvøroyri**
Húsini eru í 2 hæddum, ið hvør er umleið 64 m². Á niðaru hæddini er eitt lítið baðirúm, eitt lítið rúm og eitt størri høli, ið kann nýtast til handil ella skrivstovu. Á ovaru hæddini er íbúð við gongd, køki, stovu, baðirúmi og 2 kømrum. Kjallarin er partvís útgrivin.
Grundøkið er 264 m². Garður er frammanfyri ognina.
Húsini standa væl fyri miðskeiðis í býnum.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tel 311260 · Fax 311261 · ad@lawfirm.fo

Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.

Sosialurin 341800